# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Føðingar**



6. januar fekk Gunnrið henda fitta lítlabeiggjan. Hann vigaði 4000 gr. og var 54 cm langur. Foreldur eru Bjørg Dam og Høgni Egilstrøð Hansen, Tórshavn

29. desember fingu Sylvia (úr Norðragøtu) og Christian H. Danielsen, Lille Skensved, Danmark, eina dóttur ið eitur Elisabeth Kristianna. Hon var 52 cm. long og vigaði 4080 gr.

7. januar fingu Mai-Britt og Ísak Petersen, Viðareiði ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3500 gr.

10. januar fingu Anja Olsen og Jens K. Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4050 gr.

17. januar fingu Elsa og Kent Johannesen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3650 gr.

19. januar fingu Kristianna Mortansdóttir og Eyðun R. Jensen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4400 gr.

22. januar fingu Mása G. Tróndheim, Klaksvík og Pætur Háberg Johansen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4150 gr.

22. januar fingu Nicolina og Álvur Jøkladal, Saltangará, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4750 gr.

23. januar fingu Birgit og Niclas Thomsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3500 gr.

23. januar fingu Olanta og Eskild Norðbúð, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3700 gr.



19. januar fingu Olga Joensen og Martin Restorff, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2800 gr.

**Prógv**

Jóannes M. Johannesen, sivilverkfrøðingur og Ph. D. - ættaður av Glyvrum, men búsitandi í Keypmannahavn - hevur tann 16. januar 2008 við Københavns Universitet lokið kandidatprógv sum aktuar (cand. act.) Serritgerðin, sum hann vardi til endaligu próvtøkuna, hevði heitið »Dynamic programming and efficient hedging for unit-linked insurance contracts«.

Johan Jacobsen, Glyvrar, hevur 22. januar 2008 lokið prógv sum Cand.mag í Arabiskum á Københavns Universitet.

**65 ár**

Mánadagin 28. januar fyllir Jonhard Mouritsen, Hoyvík, 65 ár. Í samband við føðingardagin verður opið hús við brunch ***leygardagin 26. januar*** frá kl. 11 og út á seinnapartin.

**Brúdleyp**

Leygardagin 26. januar giftast í Bogota, Columbia. Liliana Nieves ú Bogota og Tummas Kastalag úr Klaksvík.
Brúdlepsadressan er :
Liliana & Tummas Kastalag
Calle 79 No. 14-59
Apartamento 402
Bogotá, Columbia

**Gullbrúdleyp**

Leygardagin 26. januar hava Ólfríða og Kristian Johansen, Strendur, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

Leygardagin 26. jan. hava Ingrid og Johannus Lydersen, Skálavík, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin hjá Ann og Sigurd Poulsen, Tjarnarlág 27, Tórshavn, frá kl 11-17. Øll eru vælkomin.

# MANO í Handilskjarnanum




Hósdagin 24. jan. læt nýggi handilin MANO upp á 1. hædd í Handilskjarnanum í miðbýnum í Havn. MANO er ein serhandil við mannfólkaklæðum í ymiskum kendum merkjunum.

Sámal Joensen, leiðari í MANO, sigur, at talan er um ein spennandi handil, har øll tey ymisku klædnamerkini eru í ymiskum deildum inni í handlinum, tað sum vanliga verður nevnt »Shop in shop«.

## Takk



Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt mintust meg á 75 ára føðingardegi mínum, veiti eg mína hjartans tøkk

**Bestu heilsanir**
**Haldgrím Gregersen**
**Syðrugøta**

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Ritu Bech** úr Lopra fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 19. Jarðarferðin verður úr Bethel í Vági leygardagin kl. 13.

**Hans Toftheyggj** í Hvalba andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi týsdagin, 78 ára gamal. Farið verður úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Hvalbiar kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Hans kunnu lata Hvalbiar kirkju eina gávu.

Kistan við **Ritu Bech** úr Lopra fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 19. Jarðarferðin verður úr Bethel í Vági leygardagin kl. 13.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri maður mín, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Jógvan Sofus Ferjá**
Gjógv

doyði og varð jarðaður.
Vit takka Hans Jákupi Joensen, biskupi og Emil Olsen, presti fyri troystarrík og vøkur orð í kapellinum og kirkjuni.
Somuleiðis takka vit kirkjutænarum, syngjarum, berarum, gravarum og tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Gjáar kirkju.
Tøkk øll tit mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Dinnafía**
**Gerda, Sjúrður, Katrin, Jónhild og Kristina**

## Tøkk

Ein hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður, pápi, sonur, bróðir og svágur okkara

**Jóan Hendrik Húsgarð**

doyði og varð jarðaður.
Tøkk fyri vitjanir og uppringingar – eisini meðan hann lá sjúkur.
Tøkk fyri kransar, blómur og gávur til Kamillianergården.
Tøkk til tykkum øll, ið vóru til jarðarferðina í Hjørring.

*Familjunnar vegna*
**Patricia og Rebecca,**
**Anna og Tróndur**